# Skulu BANKA Føroyar






**Fronsku miðlarnir rokna við, at Frakland veruliga skal geva Føroyum ein frammaná**

Tað ljóðar kanska sjálvsagt, men eftir tapið í Skotlandi er kravið um stórsigur enn meira treytaleyst frá miðlunum, sum vilja Domenech at seta fulla ferð á álopsspælið, tá hann sendir sínar menn á vøllin.

Ein lítil speisk ávaring verður tó send frá stóra ítróttarblaðnum, L'Equipe, har skemtiteknari teirra tykist bera ótta fyri, at tað kanska ikki verður heilt so lætt kortini. Á tekningini sýnir hann ein franskan landsliðsspælara – líkist Thierry Henry – í ferð við at sláa ein boksisekk niður, og tað er jú tað, sum roknað verður við.

Ávaringin sæst tó greitt í tekningini. Tí fyri stuttum hevur sekkurin – Skotland – sligið aftur, og tí liggur eisini ein fraklendingur niðursligin á myndini.

Eisini okkara egni Óli P hevur gjørt sína viðmerking til dystin í kvøld.